# Undirhaldandi valkapping og valkanning

**Á Portalinum finnur tú valsíðuna hjá Sosialinum. Har ber til at finna tað valevnið, sum hóskar best til tína politiska sannføring, og at luttaka í einari spennandi kapping um hvørji 33 verða vald**

VALSTRÍÐ
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í hesum heitu valtíðum, hevur Sosialurin framleitt eina stuttliga skipan, sum liggur á Portalinum. Við skipanini kann ein og hvør fara inn og kanna, hvørji valevni hóska best til meiningarnar hjá viðkomandi. Eisini ber til at luttaka í kappingini um, hvussu komandi løgting fer at síggja út.

### Finn títt valevni

Nú landið er vorðið eitt valdømi, kann vera torført at kenna meiningarnar hjá øllum valevnunum. Við valkanningini á Portalinum ber til at finna útav, um tað kanska er eitt heilt annað valevni enn títt lokala, sum er samt við tær.

Í kanningini fært tú 15 spurningar um øll møgulig politisk viðurskifti. Tú skalt krossa av, hvussu samd ella ósamd tú ert við spurningarnar. Hetta hava valevnini eisini gjørt, og tí ber til at samanbera svarini hjá tær við svarini hjá valevnunum. Tá ið tú hevur svarað spurningunum, koma tey valevnini fram, sum matcha best við tíni svar.

### Valkapping

Á Valsíðuni hjá Sosialinum ber eisini til at luttaka í kappingini um, hvørji 33 umboð verða vald 19. januar. Tú skalt krossa av, hvørji umboð tú roknar við koma inn fyri ymsu flokkarnar. Øll, sum gita rætt luttaka í kappingini um eina flogferð fyri tvey á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Tú skalt upplýsa navn, aldur, kyn, sýslu og telefonnummar. Hvørt telefonnummar kann bert luttaka í kappingini einaferð. Telefonfelagin, sum stendur fyri telefonini, fær vinningin sendandi. Tí er umráðandi, at onkur stendur fyri telefonini.

Jens Pauli Rasmussen er maðurin handan Valsíðuna hjá Sosialinum. Hann er eisini maðurin handan InternetSosialin.




*Linkið til valsíðuna er at finna ovast á Portalinum*



**Tað ber til at standa saman og lyfta í felag**

- 12 mánaða barsilsskipan
- Fólkaskúlin skal raðfestast høgt
- Pensjonistar skulu hava betri sømdir
- Fiskidagamarknaður setast á stovn
- Sterkur búskapur

Stakir uppihaldarar skulu kunna fáa sær eina útbúgving og liva á jøvnum føti við aðrar føroyingar. Tað ber ikki til í dag. Og tað er stór skomm.

**Eitt samfelag, har tey veiku hava tað gott, er eitt gott samfelag.
Og eitt samfelag, sum strembar eftir sjálvbjargni, er eitt sterkt samfelag.**

HELENA C

helena.fo JAVNAÐARFLOKKURIN